GJALDSTOVAN

Um lógarskylduna at senda landinum talgildar rokningar

Góði almenni stovnur,

Í skjótt 9 mánaðir hevur verið lógarkrav um, at veitarar senda landinum talgildar rokningar, og undirskilt er tað eisini ein skylda hjá almenna stovninum at tryggja, at lógarkravið verður fylgt.

Eftir 1. november 2018 ljóslesur Gjaldstovan, meginregluliga, ikki longur rokningar til Rokningaverkgongdarskipanina frá veitarum, sum skulu senda landinum talgildar rokningar. Tað áliggur stovni tykkara at senda rokningar, sum koma við teldubrævi ella vanligum posti aftur til veitaran við boðum um, at senda talgildar rokningar – t.d. við at nýta Rokningaportalin á www.gjaldstovan.fo.

Tað er ikki í lagi at nýta funkuna i**nnanhýsis skjal** sum frávik frá lógarkravinum um, at veitarar skulu senda landinum talgildar rokningar.

Í yvirlitinum, sum finst á leinkinum https://gjaldstovan.fo/Gjaldstovan/asetingar/talgildar-rokningar/ eru teir fleiri enn 300 føroyskir veitarar, sum í 2018 í meira og minni mun hava sent talgildar rokningar til landið. Almenni stovnurin skal, sambært lógini um talgildar rokningar, altíð upplýsa veitaranum EAN/GLN nr. og aðrar neyðugar eyðkennisupplýsingar.

Føroyskir veitarar, sum enn ikki senda talgildar rokningar, eru kunnaðir um, at Gjaldstovan og almennir stovnar praktisera ikki longur, at "tú hevur fingið frávik frá lógarkravinum, so leingi tú ikki hevur móttikið beinleiðis kravboð um senda talgildar rokningar".

Gjaldstovan hevur nú boðað veitarum frá, at teir hava eina freist til 1. november 2018 at fáa viðurskiftini í rættlag.

--

Tørvar tykkum framvegis kunning um at senda talgildar rokningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til Brynleif Poulsen, roknskaparleiðara, tlf. 21 49 60 ella brynleif@gjaldstovan.fo.